StÍF-H71 30-19 (12-10):

# Klassamunur – og gott tað

**Hóast hoyvíkingar fylgdu so nøkulunda við strandingum í fyrra hálvleiki, høvdu teir ikki ein livandi kjans, tá StÍF í seinna hálvleiki setti ferðina upp og spældi, sum væntast kann av einum oddaliði**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*



*StÍF rætt og slætt hølvaði H71 av, tá hoyvíkingar vitjaðu sunnudagin*

Nú grundspælið er farið at nærkast endanum, eru strandingar greitt oddalið í bestu mansdeildini. Teir eru trý stig framman fyri VÍF, fýra framman fyri Neistan og seks stig framman fyri Kyndil.

Sigurin á hoyvíkingum styrkti oddastøðuna hjá StÍF, tá VÍF samstundis bara fekk javnleik móti Kyndli. Men kortini bíðaðu strandingar ein hálvleik, áðrenn teir av álvara vístu, at fremstaplássið er uppiborið.

Lítið veiggj var yvir spælinum í fyrra hálvleiki, og hugflog var so at siga einki hjá StÍF.

Av tí sama megnaði liðið hjá H71, ið annars ikki hevur víst tað stóra í vetur, at fylgja vertunum líka til hálvleiks.

Verður hugt at, hvussu liðini bæði eru mannað, skuldi tað ikki borið til, men hoyvíkingum til rós, so tóku teir kjansirnar, teir fingu, og teir stóðu lítið og einki aftan fyri StÍF fyrsta hálva tíman.

## Heilt annað spæl

Hetta mundu teir í umklæðingarrúminum hjá StÍF eisini vera fullgreiðir yvir í steðginum, tí tá teir komu innaftur til seinna hálvleik, var tað sum at síggja eitt heilt annað lið á vøllinum.

Ið hvussu er var talan um heilt annað spæl, sum sama liðið vísti, tí longu frá fyrsta bríkslið hevði StÍF sett ferðina upp og fingið krydd í spælið, so tað líktist meira tí, vit kenna StÍF fyri, tá rætta lagið er.

Nú var brádliga stórt hugflog yvir spælinum, og ikki gekk long tíð, so stóð øllum greitt, at tað ikki er tilvild, at hetta vóru toppur og botnur, ið hittust á Skála.

Tað vísti seg skjótt, at einasta nevniverda hóttanin hjá H71 er Halgir Dahl Olesen, ið kortini ikki kann vinna dystirnar einsamallur – í øllum førum ikki, tá mótstøðuliðið eitur StÍF.

Serliga kom hetta til sjóndar, tá strandingar onkra ferð í seinna hálvleiki tóku Halgir burturúr. Tá vísti tað seg, at restin av liðnum smokkaði saman, tí eingin megnaði nakað sjálvur, tá eingin Halgir var at spæla til.

So við og við ásannaði H71, at dysturin var taptur, og tað gav yngri spælarum møguleika at royna seg.

Tað broytti tó einki um støðuna, og StÍF vann ein sannførandi sigur við sínum góða og skjóta spæli í seinna hálvleiki, ið staðfesti, at strandingar meina tað í álvara og avgjørt ikki bara eru oddalið til stuttleika.

Og tá StÍF nú skuldi hava ein taman og vánaligan fyrra hálvleik, so kunnu strandingar um ikki annað gleðast um, at tað ikki var móti einum betri liði.

**StÍF-H71 30-19 (12-10)**

Málskjúttar:
**StÍF:** Alexander Johansen 8, Sveinur Justinussen 6, Bent Djurhuus 5, Costin Dumitrescu 3 (1), Artur Johansen 3, Andre F. Danielsen 2, Jón Rasmussen 2, Janus Trúgvason 1
**H71:** Halgir Dahl Olesen 9, Jákup á Borg 3, Tróndur Vatnhamar 3 (1), Niels V. Niclasen 2, Johnny Durhuus 1, Hans J. Jacobsen 1, Esbern Patursson 1
Brotskøst: StÍF 3, H71 1
Útvísingar: StÍF 2, H71 4
**Dómarar:** Trygvi Mortensen og Kári Hansen

KÍF-Tjaldur 32-26 (15-12):

# Tjaldursmálverjin bleiv burturvístur

**Fyri fyrstu ferð í mong harrans ár brúktu dómararnir í dystinum millum KÍF og Tjaldur harðastu revsingina, tá teir krossaðu armarnar og vístu Dejan Lacok burtur úr Hoyvíkshøllini, eftir at hann hevði gjørt seg inn á Jónálv Johannesen**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Sjáldan hendir nakað ógvusligari í einum hondbóltsdysti, enn at ein útvísing í tveir minuttir ella eitt reytt kort kann klára tað.

Men sunnudagin hildu dómararnir málverjan hjá Tjaldrinum fara so langt, at teir náðileyst krossaðu armarnar, ið merkir burturvísing.

Hetta er harðasta revsing, nakar hondbóltsspælari kann fáa í dysti, og tað er eisini ótrúliga sjáldan, at hon kemur fyri.

Samstundis merkir burturvísingin, at liðið hjá revsaða spælaranum ikki kann seta annan mann inn í staðin, og tí mátti Tjaldur sunnudagin spæla síðstu 26 minuttirnar við seks monnum móti sjey.

Fýra minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, tá Jónálvur Johannesen hjá KÍF leyp inn og skoraði. Í atsóknini kom hann nakað langt inn, og bæði hann og málverjin hjá Tjaldri fóru um koll.

Jónálvur var fyrri uppi og skumpaði so hin, og tað fekk hann eisini útvísing fyri. Men áðrenn dómararnir vóru lidnir við sítt, vildi Dejan Lacok sleppa at hevna seg eisini, og tá kókaði yvir.

Hann sparkaði og rakti Jónálv, og eftir tingingar sínámillum samdust dómararnir Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen um, at so var burturvísingin einasti og seinasti útvegur hjá Lacok.

## Sást ikki aftur

Nú vóru góð ráð dýr hjá Tjaldri, ið longu var aftanfyri við fýra málum. Útispælarin Terji Hansen varð settur í málið, har hann – uttan tær stóru royndirnar – royndi at gera sítt besta.

Teir, ið eftir vóru á liðnum hjá Tjaldri, royndu eisini í sínum lagi at stríðast sum frægast restina av dystinum, og satt at siga komu teir rímiliga væl frá uppgávuni, hóast tap stóð í hendi og eisini gjørdist endin.

Tað vísti seg ikki, at brádligi meirilutin á vøllinum styrkti stórvegis um spælið hjá KÍF, ið nú skuldi havt bæði pláss og náðir til at lagt lunnar undir ein stórsigur.

Í staðin tóktist tað ikki, sum kollfirðingar fangaðu møguleikan rættiliga, og hóast kjansirnir ikki trutu, høvdu teir fleiri løgnar og býttisligar royndir móti Tjaldursmálinum, heldur enn at taka uppgávuna í fullum álvara og smyrja undirmannaðu gestirnar av.

Hetta var annars upplagdur møguleiki hjá KÍF at fáa sær eina trivaliga málúrtøku, men tá avtornaði sunnudagin, var javnvágin millum vunnin og tapt mál ikki komin longur enn upp á null.

At umstøðurnar nú vóru eitt sindur út yvir tað vanliga, gjørdi sítt til, at dysturin ongantíð rakk hæddirnar, og tað stóra hondbóltsspælið fer neyvan nakar at minnast hann fyri.

Fyrri hálvleikur hevði verið á einari leið, men í seinna hálvleiki fekk omanfyri nevnda hending lagt sín skugga á báðar partar, og ikki fyrr enn heilt móti endanum fór tað aftur at líkjast.

Sum vera man, vann KÍF, men sigurin var ikki so stórur og sannførandi, sum hann átti at verið tað móti Tjaldri, ið helst má finna sær avloysara í málinum fyri meira enn bara ein dyst.

**KÍF-Tjaldur 32-26 (15-12)**

Málskjúttar:
**KÍF:** Damir Odos 8 (2), Mirko Milinkvic 7, Petur Martin Poulsen 5, Eddie H. Joensen 3, Jónálvur Johannesen 3, Rógvi Weihe 3, Kristjan Madsen 2, Finn Heri Johannesen 1
**Tjaldur:** Dragisa Stojovic 8, Jens Martin Knudsen 7 (1), Sverri Justinussen 4, Tórhallur Thomsen 4, Ken Bærentsen 1, Áki L. Hansen 1, Dejan Lacok 1
Brotskøst: KÍF 2, Tjaldur 1
Útvísingar: KÍF 5, Tjaldur 4
Burturvísing: Tjaldur 1
Dómarar: Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen



Kyndil-VÍF 23-23 (11-13):

# Óbrúkiligur javnleikur

**Hjá Kyndli var tað ikki til aðra nyttu, enn at bjarga heiður og æru móti VÍF, at dysturin sunnudagin endaði við javnleiki. Og vestmenningar fáa líka nógv burtur úr javnleikinum, sum teir høvdu fingið burtur úr sigri**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*



*Kyndil hevði alla tíðina eitt sera gott tak á VÍF, men tað eydnaðist kortini VÍF at fáa ein brúkiligan javnleik burturúr, meðan einsamalla stigið ikki gevur Kyndli nakað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tú kanst ongantíð siga frammanundan, hvussu tað fer at spæla av, tá mansklassikarin millum Kyndil og VÍF er á skránni.

Hetta var dysturin sunnudagin enn eitt dømi um. Hóast Kyndil hevði heimavøll á Hálsi, var VÍF kortini at meta sum eitt slag av favoritti.

Kyndil legði betur fyri og kom á odda 3-1, men so raknaðu vestmenningar við og løgdu seg á odda.

Og har vórðu teir verandi eftir ætlan, líka til eitt korter var eftir. Tá fór Kyndil upp á javnt og seinni framum, og í grundini var Kyndil nærri sigrinum enn VÍF.

## Klossutur Negru

Nú hvørki Áki Olsen ella Sámal Joensen eru tøkir hjá VÍF, er ikki tað sama bitið yvir álopsspælinum, sum tað plagar at vera.

Sunnudagin var hartil heldur einki hugflog yvir álopsspælinum hjá vestmenningum, ið als ikki sluppu so lætt framat, sum teir fleiri ferðir fyrr í vetur hava gjørt.

Í fyrra hálvleiki var nógv størsta hóttanin høgi Piti Negru, ið fekk mál, tá hann fekk loyvi at fáa ferð og styrki í skotini — og tað fekk hann ofta frá verjuni hjá Kyndli, ið ikki dugdi at steðga honum.

Men samstundis var Negru eisini klossutur í verjupartinum og fekk longu í fyrra hálvleiki tvær útvísingar fyri ov óstortligt verjuspæl.

Hóast tað, so valdi VÍF í løtum at satsa upp á hann í verjuni, heldur enn í álopinum.

Og bara sjey minuttir inn í seinna hálvleik kom rokningin, tá Piti Negru fyri triðju ferð sá báðar dómarafingrarnar og noyddist undan hinum undir brúsuna.

Kann vera, at verjan hjá VÍF viknaði eitt sindur av hesum, men í øllum førum var ein stór skothóttan burtur í hinum endanum, og tað kanska kostaði sigurin.

## Varierað spæl

Í sínum lagi royndu Kyndlamenn at stríðast fyri sakini, hóast tað tóktist møtumikið hjá teimum.

Alla tíðina vóru teir tvey og trý mál aftan fyri VÍF, og hvørja ferð Kyndil fekk svarað aftur, kom VÍF aftur við einum máli ella tveimum — og so reyk tann spenningurin.

Moralskt stóð liðið hjá Kyndli kortini sterkt á vøllinum, og menn fóru ongantíð niður við nakkanum.

Jacob Jónsson og Jónleif Sólsker skiftust um at skipa spælið, og tað gjørdu teir á hvør sín hátt. Hesar variatiónirnar skakaðu verjuna hjá VÍF, ið so spakuliga misti takið, samstundis sum innskifti Lars L. Black í Kyndlamálinum arbeiddi seg væl upp.

Við fleiri bjargingum á rað eydnaðist honum at steðga fleiri góðum álopum hjá VÍF, og hóast Kyndil brendi dúgliga í hinum endanum, har Bárður Nielsen eisini stóð væl, sá dysturin út til at venda, tá seinni hálvleikur var hálvrunnin.

Eftir tíggju minuttum fekk Kyndil vent gongdini frá at vera aftanfyri 17-18 til at koma framum 21-19, og so sá út til, at teir grønu skuldu fáa stigini.

## Til fánýtis

Sum so hevði Kyndil rímiliga gott tamarhald á støðuni, men so hvørt sum tað fór at nærkast endanum og tvey stig vóru í eygsjón, gjørdu nervar vart við seg.

Bóltar vórðu tveittir burtur og málkjansir misbrúktir, og hetta útnyttaði roynda VÍF-liðið til fulnar við at fáa síni mál, tá tørvur var á tí.

Við hesum dáminum yvir síðstu løtuni fingu vestmenningar við tveimum málum frá Daniel Rapa etið seg upp á javnleik 22-22, tá bara góðir tveir minuttir vóru eftir. Men so fekk Kyndil brotskast, og Hans Áki Dahl-Christiansen kundi fyri fimtu ferð frá strikuni skorað fyri Kyndil til 23-22.

Løtu seinni var aftur møguleiki hjá heimaliðnum at lata aftur og sløkkja, men í skundi misbrúkti Kyndil møguleikan, og so var eingin slingur í valsinum, tá VÍF í sínum síðsta álopi aftur fekk mál og kundi tryggja sær javnleik 23-23.

Fyri vestmenningar hevði tað ikki so øgiliga nógv at siga, um teir vunnu ella tað endaði við javnleiki, tí hetta var tann fyrsti hjá teimum í vetur. Teir skulu bara ikki fáa ein aftrat, so telur hesin eins nógv og ein sigur, tá stigini verða koyrd niður í helvt eftir nýggjár.

Hinvegin var javnleikurin til fánýtis hjá Kyndli, ið longu hevur ein frammanundan.

Men eitt kunnu teir grønu tó brúka hann til, og tað er at staðfesta fyri sær sjálvum og øðrum, at eisini í vetur eru teir førir fyri at vera partur í klassikaranum og at seta sín dám á — uttan at vestmenningar vinna!

Og tað kann telja nokk so nógv, hóast tað ikki sæst aftur á stigatalvuni um nakrar vikur_

**Kyndil-VÍF 23-23 (11-13)**

Málskjúttar:
**Kyndil:** Hans Áki Dahl-Christiansen 7 (5), Jacob Jónsson 5 (1), Finnur Hansson 3, Regin Johannesen 2, Høgni Klein 2, Jónleif Sólsker 2, Heini Bendtsen 1, Janus Einar Sørensen 1
**VÍF:** Ingi Olsen 6 (2), John Zachariasen 5, Piti Negru 4, Daniel Rapa 4, Agnar Joensen 2, Ólavur Brimnes 1, Áki Gaardbo Olsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, VÍF 2
**Útvísingar:** Kyndil 2, VÍF 5
**Diskvalifikatión:** VÍF 1
**Dómarar:** Kristian Johansen og Sámal Hansen